**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogar til Bústovnin á Eirargarði 16 A-16BN

Undir Heimarøktini – og Serforsorgini og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum Eirargarði 16 A/BN verður søkt eftir avloysarum/pedagogum til setan 15.10.2005, ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan.

Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Løn- og setunartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Um eingin pedagogur søkir, verða størvini sett við hjálparfólki sambært sátttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu vera Bústovninum í hendi í seinasta lagi 15.09.05 kl. 12.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423.

**Bústovnurin á Eirargari 16 A/BN**
FO-100 Tórshavn
Att: Leiðarin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# m/b Leikur - til sølu



Ein sera væl umgingin Hvalvík 800, við stórum lugari, er til sølu. Útgjørdur sum fiskibátur og sum frítíðarbátur. Brúktur til útróður og til útferðir í Føroyum og uttanlands. Hevur fiskiloyvi í bólki 5B
**Moturur:** Beta Marine (Ford) 128 Hk - 6 syl.

**Tól:** kumpas, radar, ekkolod, GPS - litplottari,VHF, radio, tlf.
**Fiskitól:** hydrauliskt línuspæl og el-snellur
**Annað:** bjargingarbátur við bd.botni, prosending har alt dekkið verður innilokað, koyggjur, vask, turrklosett o.a.

**Verður seldur um hóskandi boð er**

**TEL 421 300**
(best aftan á kl. 18.00)




Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4033**
**Navn:** Sp/f Jónfinn Thomsen, adv.
**Adressa:** Áarvegur 1 Postbox 52 110 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 01-08-2005
**Viðtøkudato:** 01-08-2005
**Stovnarar:**
Jónfinn Thomsen, Sóljuteigur 9, 360 Sandavágur
**Stjórn:**
Jónfinn Thomsen, Sóljuteigur 9, 360 Sandavágur, (stjóri)
**Grannskoðari:**
P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Endamál:** Endamál felagsins er a reka advokatvirki o.a. í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
01.01.2005 - 31.12.2005

*Skráseting Føroya*
*tann 07. september 2005*

*Kristin Balle*


16. september 2005



# MESSUSKÚLI
-altso um básar og messur!

Brúka tit, umframt nógvar arbeiðstímar, eisini fleiri 10.000 kr. til at luttaka við einum bási á messum her heima ella uttanlands? Ella umhugsað tit at luttaka á messum í næstum?

Eru tit í iva, hvørt tað nyttar ella hvussu tit skulu bera tykkum at? Kundu tit hugsað tykkum at fingið íblástur til, hvussu tit tryggja, at tit fáa nakað burturúr tíðini og pengunum sett verður av til hetta?

- Hvat er ein rættur básur?
- Hvat skalt tú leggja dent á?
- Skalt tú fylla básin við alskyns vørum og tænastum, ella er tað einfalda best?
- Hvat skalt tú gera áðrenn og aftaná?
- Hvat er eitt MUST og hvat er absolutt bannlýst?

Bjørn Malmstrøm er fyrrverandi stjóri á Svenska Messan. Tann 16. september 2005 kemur hann at hava skeið um hvussu tú fært mest møguligt burturúr tínari messuluttøku. Bjørn hevur nógvar royndir við messum, bæði í teori og praksis.

*Málbólkur: Fyritøkur sum javnan hava bás á messum, bæði herheima og uttanlands. Fyritøkur sum umhugsað at luttaka á messum, fólk á marknaðardeildum og søludeildum, sum antin fyrireika ella luttaka aktivt á messum sum sølufólk. Eisini er tað upplagt hjá starvsfólkum á lýsingastovum at luttaka.*

Synergi
Tilmelding og meira um tiltakið á www.synergi.fo
tel 22 RING (22 74 64) · fax 322 355 · synergi@synergi.fo

Sosialurin